**Kunning viðvíkjandi løn og eftirløn hjá tingmonnum**

Nú so nógv hevur verið skrivað seinastu tíðina um lønir og eftirlønir hjá tingmonnum, og samsvarandi nógvir spurningar eru settir umsitingini um hetta sama frá tingmonnum, skal hervið verða kunnað generelt um skipanina.

*Løgtingsmenn*

Løgtingsmenn fáa eina mánaðarløn, ið er 38.585,22 kr. Harumframt fáa allir 2.000,00 kr. skattafrítt, ið er eitt kostnaðarískoyti til ymsar útreiðslur, sum kunnu standast av arbeiðinum sum tingmaður.

Tingmenn fáa eisini eitt skattafrítt kostnaðarendurgjald fyri flutning millum heimstað og Løgtingið í 100 dagar um árið. Tingmenn fáa í tímapeningi 150 kr. pr. dag í 100 dagar um árið, tó fáa tingmenn úr Suðuroy 250 kr. pr. dag. Hesi endurgjøld fáa tingmenn búsitandi í Suðurstreymoy ikki.

Limirnir í formansskapinum (næstformenninir) og nevndarformenninir fáa harumframt 2.500,00 kr. um mánaðin.

Tingmenn vinna eisini rætt til eftirløn soleiðis, at teir fyri 1-8. árið fáa rætt til 4,5% av lønini pr. ár, og 3% fyri 9-16. árið. Tá tingmaður hevur sitið á tingi í 16 ár, hevur hann sostatt rætt til 60% av lønini í eftirløn frá 67 ára aldri.

*Løgtingsformaðurin*

Løgtingsformaðurin fær sambært lógini somu løn sum løgmaður, tvs. 80.781,18 kr. um mánaðin. Hann vinnur eisini eftirløn soleiðis, at hann fær rætt til 9% av lønini í eftirløn frá 67 ára aldri, fyri hvørt árið tey fyrstu 4 árini, og síðani 6% tey næstu 4 árini.

*Eftirlønir*

Sambært lógini kann eingin tó fáa meira enn 60% av lønini í 40. lønarflokki í eftirløn, tvs. 37.283,62 kr. tilsamans. Hetta er galdandi fyri allar tænastumannalíknandi eftirlønir, t.d. sum løgtingsformaður, tingmaður, tænastumaður, landsstýrismaður, fólkatingsmaður, borgarstjóri e.l. Um so er, at samlaða eftirlønin fer upp um hesa upphædd, verður eftirlønin frá Løgtinginum sett niður samsvarandi.

Tingmenn kunnu í serligum førum fáa eftirløn frá 60 ára aldri. Hetta er, tá aldurin á tingmanninum, tá hann gevst í tinginum + tvær ferðir starvsaldurin í tinginum og landsstýrinum tilsamans gevur 95 ár.

Johnhard Klettheyggj
løgtingsstjóri